

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 10 - 2011

# Bretar vilja hava norskt gass

Noreg hevur tryggjað sær, at Bretland fer at keypa norskt gass í mong ár frameftir. Tað bleiv staðfest í gjár, tá norski olju- og orkumálaráðharrin, Ole Borten Moe, var í London og skrivaði undir ein sáttmála við bretska starvsbróður sín, Chris Huhne. Ole Borten Moe er sera væl nøgdur við tann nýggja sáttmálan, tí Bretland er ein tann týdningarmesti gassmarknaðurin hjá norðmonnum. Bretland keypir sum er ein fjórðing av tí gassinum, sum norðmenn selja. Teir báðir ráðharrarnir siga í einari felags fráboðan, at Noreg og Bretland eru samd um at økja samstarvið á orku-, olju- og veðurlagsøkinum í komandi árum.